Búskapur og vinna:

## Ferðast minni

Danir tykjast ikki hava so góðan hug at ferðast í ár. Feløgini, sum selja uttanlandsferðir, siga, at tey hava munandi færri bíleggingar í ár enn undanfarin ár, og sum tað gongur nú, er líkt til, at feløgini fara at selja minni enn eina millión uttanlandsferðir í ár. So lítil hevur ferðahugurin hjá dønum ikki verið síðani 1990. Bara higartil í ár eru seldar 100.000 uttanlandsferðir færri enn um somu tíð í fjør.

Tann minkandi ferðahugurin kemur floghavnunum illa við. Bæði í Kastrup og Billund siga tey, at talið á ferðafólkum, sum fara av landinum at ferðast, er millum 20 og 30 prosent minni enn í fjør. Hjá floghavnini í Billund er hetta ivaleyst serliga óheppið, tí floghavnin er júst útbygd fyri hundraðtals milliónir krónur.

## Vilja hava upplýsingar

ES leggur nú stórt trýst á myndugleikarnar í Sveits fyri at fáa teir at broyta galdandi skipan, sum ger, at tað er at kalla vónleyst at fáa upplýsingar um, hvør eigur pengar í teimum sveitsisku bankunum.

Málið er komið upp á hægsta politiska stig í ES og var m. a. til viðgerðar, tá fíggjarmálaráðharrarnir í ES-londunum hittust í Luxenbourg í gjár. Higartil hava sveitsisku myndugleikarnir ikki viljað broytt galdandi skipan.

## Stórt inntøkufall

Tað gongst illa hjá donskum bøndrum, sum ala svín, og alt bendir á, at árið í ár verður tað ringasta í fleiri ár. Eitt yvirlit hjá landbúnaðarfelagnum vísir, at rakstrarúrslitið hjá svínagørðunum fer at fella úr 720.000 krónum í fjør í 190.000 krónur í ár. Taðer ein munandi størri inntøkumissur, enn landbúnaðarfelagið hevði roknað við. Sambært landbúnaðarfelagnum er prísurin á svínakjøti fallin nógv orsakað av harðari kapping úr Kanada og Brasilia.

UTTAN ÚR HEIMI

# Putin roynir semju millum India og Pakistan



*Pakistanskir hermenn lurta eftir einum generali, sum vitjaði hermenninar, sum hava støð við indiska markið*

**Samstundis heldur orðastríðið fram millum leiðararnar í teimum báðum londunum.**

KASHMIR-STRÍÐIÐ
*Árni Joensen:*

Nú indiski forsætisráðharrin, Atal Behari Vajpayee, og pakistanski forsetin, Pervez Musharaf, eru á miðasiatiskum toppfundi í Kasakhstan, er russiski forsetin, Vladimir Putin, farin undir eina diplomatiska roynd at fáa tey bæði londini til samráðingarborðið um Kashmir-stríðið.

Russiska semingsroyndin byrjaði í gjár, og frammanundan hevði Putin fingið stuðul frá ES og USA. Eydnast tað ikki russiska forsetanum at loysa kreppuna, skal amerikanski verjumálaráðharrin, Donald Rumsfeld, taka við sum semingsmaður.

Samstundis helt orðastríðið millum India og Pakistan fram. Indiski forsætisráðharrin, Atal Behari Vajpayee, segði í gjár, at Pakistan hevur ikki tikið eitt einasta stig til tess at forða uppreistrarmonnum at fara um markið í Kashmir at gera seg inn á indiskar hermenn og sivilfólkið. Indiski stjórnarleiðarin vildi vera við, at virksemið hjá uppreistrarmonnunum er vaksið seinastu tíðina hóast lyfti úr Pakistan um at forða tí.

Pakistanski forsetin, Pervez Musharaf, segði í sínum lagi, at India sýtir fyri atgeva fólki tess lógliga rætt til frælsi. Hann legði afturat, at Pakistan vil ikki hava kríggj, men at landið fer at verja seg við øllum miðlum, verður tað álopið.

# Finna ongan fígginda í Afghanistan

**Amerikansku og bretsku hermenninir í Afghanistan eru ørkymlaðir, tí teir finna ongan fígginda**

AFGHANISTAN
*Árni Joensen:*

Amerikansku og bretsku hermenninir, sum seinastu vikurnar hava leitað eftir monnum hjá al-Qaeda og Taliban í fjøllunum har eysturi í Afghanistan, eru farnir at ivast í, um nakar er eftir at berjast ímóti.

170 amerikanskir fallskíggjahermenn hava rannsakað níggju fjallaholur seinastu vikurnar.

– Vit høvdu vónað at finna í hvussu er okkurt, annaðhvørt hermenn ella vápn og aðra útgerð. Vit funnu nøkur skjøl og onkur vápn, men har var ikki minsta tekin til, at nakað menniskja hevur verið har nýliga, segði ein talsmaður hjá amerikansku hermonnunum í gjár.

Longur suðuri hava bretskir hermenn leitað eftir monnum úr Taliban og al-Qaeda á leiðini við býin Khost, men enn hava teir ongan funnið.

– Vit komu higar at berjast og at gera av við al-Qaeda, men enn hava vit ongan sæð, segði majorurin Rick Stephens, sum stendur á odda fyri teimum bretsku hermonnunum, sum hava støð við Khost. Sjálvur heldur hann, at Taliban og al-Qaeda eru rýmdir um markið inn í Pakistan.

Sambært amerikansku herleiðsluni hava amerikanskir hermenn ikki verið í bardaga í Afghanistan síðani í mars. Hesa somu tíðina hava bretskir hermenn gjørt fýra herferðir í fjøllunum uttan at hava sæð ein einasta fígginda.

Amerikanarar halda kortini, at limir í Taliban og al-Qaeda eru framvegis í fjallalendinum har eysturi í Afghanistan, men at tað er sera trupult at finna teir, tí teir kenna lendið til fulnar.

Úr Norðurlondum:

## Grundlóg lítlan áhuga

Tá danska grundlógin fylti 150 ár í 1999, samtykti Fólkatingið at játta fýra milliónir krónur til tiltøk, sum høvdu til endamáls at umrøða grundlógina. Á tann hátt vónaðu politikararnir at fáa eina ábending frá fólki, um og hvat tey møguliga vilja hava broytt í lógini.

Men áhugin fyri at umrøða grundlógina hevur verið so lítil, at higartil eru bara 1,7 millión krónur nýttar til endamálið. Tað hevur víst seg, at fá fólk koma á fundirnar, og at tað almenna stundum hevur goldið oman fyri 300 krónur í stuðuli fyri hvønn fundarluttakaran.

Svend Auken, sum er næstformaður í Fólkatinginum, sigur kortini, at tað er umráðandi, at fólk umrøða grundlógina. Sum so nógvir aðrir politikarar heldur hann, at tíðin er komin til at gera ávísar broytingar í teirri gomlu lógini.

## Greenpeace tók skip

Tólv limir í umhvørvisverndarfelagsskapinum Grennpeace steðgaðu týsdagin skipinum »Fagervik« í havnini í svenska býnum Norrkøping. Skipið siglir millum Svøríki og Bretland.

Greenpeace krevur, at skipið fær forboð fyri at sigla fyribils. »Fagervik« æt fyrr »Figaros«, og skipið er fyrr ákært fyri at hava latið nógva olju í havið í Eystrasalti. Skiparin og maskinmeistarin vórðu í februar ákærdir fyri at hava latið 1000 litrar av olju út í Eystrasalt, men teir vórðu frídømdir, tí tað kundi ikki prógvast, at teir høvdu latið oljuna í havið vil vilja.

Greenpeace sigur, at skipið eigur ikki at sleppa úr Norrkøping, fyrr enn reiðaríið hevur váttað, at skipið fer ikki at lata olju í havið aftur.

## Frp. størstur

Ein veljarakanning vísir, at Framburðsflokkurin er størsti flokkur í Noregi. Kanningin gevur flokkinum 25 prosent av atkvøðunum. Arbeiðaraflokkurin fær 20 prosent, og Høgri er triðstørstur við 19,5 prosentum.

ítróttur

Nr. 104 • mikudagur • 5. juni 2002 • 76. árgangur • www.sosialurin.fo

# Klaksvíkingar mistu hálvt hundrað túsund



*Vánaliga veðrið viðførdi, at óvanliga fáir norðoyastevnugestir vóru, og alt í alt kostaði hetta helst klaksvíkingum um 50.000 kr.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Ólagaliga veðrið og ólagaliga ferðasambandið høvdu við sær, at tað vóru nógv færri áskoðarar til kappróðurin í Klaksvík, enn tað frammanundan kundi roknast við, at tað fóru at vera**

KAPPRÓÐUR
*Jóannes Hansen*

Veðrið skikkaði sær illa á norðoyarstevnuni. Tað oysregnaði allan leygardagin, og tað var nógvur vindur. Hetta hevði við sær, at áskoðararnir, sum møttu upp á havnarøkinum vestanfyri og á Kósabrúnni og Stongunum eystanfyri, vóru heilt fáir. Kanska færri enn tvey hundrað, frætta vit úr Klaksvík. Umframt at líkindini vóru so vánalig, so halda teir í Klaksvík, at tað heldur ikki kann síggjast burtur frá, at áhugin millum teirra, sum fylgja væl við í kappróðri, ikki var so stórur at koma til Klaksvíkar, sum hann onkuntíð hevur verið. Smyril plagar at føra bátar og fólk á norðoyarstevnu, men hann var og er í dokk. Í norðoyarstevnuvikuni var tað eitt sindur ógreitt, hvussu tað fór at verða við ferðingini, og tað hevur ivaleyst havt við sær, at tað eru tey, sum eru setst aftur.

Kristian Eli Zachariasen er formaður í Klaksvíkar Róðrarfelag. Tá vit tosaðu við hann mánadagin, høvdu teir ikki gjørt stevnuna upp, men hann helt tað ikki vera nakran iva um, at teir sótu eftir við einum undirskoti.

– Tað kostar eitt sindur at vera vertur fyri kappróðrinum. Ein tann største posturin er, at kappróðrarfólkini skulu hava eina máltíð. Harafturat eru tað nógvir smáir postar, sum tilsaman bera eina hampuliga fitta útreiðslu við sær. Trý tey seinastu árini hevur veðrið verið gott. Vit hava fingið omanfyri hálvt hundrað túsund krónur inn í atgongugjaldi. Tá vit hugsa um, at áhugin fyri kappróðri millum klaksvíkingar og norðoyingar er størri nú, enn hann hevur verið, so høvdu vit í hvussu so er roknað við at fingið tað sama inn, sum vit hava fingið undanfarnu árini, men veðrið gjørdi, at tað fullkomuliga kiksaði við áskoðarum, sum møttu upp innanfyri, har sum tað varð krevt inn. Kanska møttu tvey hundrað fólk upp – og í hvussu so er ikki fleiri enn so.

### Fínar losjur

Í stóru fótbóltsfeløgunum kring heimin verður nógv gjørt burturúr, at áskoðararnir, sum eru bestu stuðlarnir hjá feløgunum, skulu kenna seg væl, tá teir møta upp til dystirnar. Teir verða vístir til og hýstir í serligum losjum, har alt tað er at fáa, sum hugsast kann í sambandi við fótbólt.

Klaksvíkar Róðrarfelag hevur ongar sovornar losjur at vísa á og hýsa áskoðarunum í. Men kortini eru umstøðurnar hjá áskoðarunum til at hyggja at kappróðri á norðoyarstevnu framúr góðar. Á Stoksoyrum og Myrkjaroyrum eru fleiri hundrað hús í traðunum, sum vórðu innlagdar fyri hundrað árum síðani og meiri enn tað og í høgunum hjá bóndunum í Vági og á Biskupsstøð. Í fjálgu stovunum var nógv fólk leygardagin. Tey sóu og hoyrdu frá kappingunum, men sjálvandi gav hetta ikki nógv í kassan hjá Róðrarfelagnum. At fara inn til privatfólk at krevja pengar, tí tey og gestirnir hyggja út ígjøgnum vindeygað hevði verið at gjørt seg inn á frælsið hjá tí einstaka!

Onkur helt fyri at tað hevði kanska verið vert at umhugsað at sent nøkur oyru til kappróðrarfelagið. Tað stendur upp til hin einstaka, men hervið er hugskotið latið almenninginum.

### Nøgdir við úrslitini

Í fjør vunnu klaksvíkingar tríggjar róðrar á norðoyarstevnu. Tá vunnu genturnar umborð á Fípuni Føgru, kvinnurnar umborð á Páll Fanga og menninir umborð á Nevinum Reyða. Hesa ferð vunnu tvær manningar hjá Klaksvíkar Róðrarfelag – dreingirnir umborð á Fípuni Føgru og menninir umborð á Páll Fanga.

Kortini sigur formaðurin í Klaksvíkar Róðrarfelag, at hann er væl nøgdur við úrslitini á norðoyarstevnu:

Umframt at vinna tveir róðrar, so vóru vit við til at mynda allar hinar kappingarnar – burtursæð frá kappingini millum 8–mannafør, har vit ikki tóku lut. Genturnar og kvinnurnar vóru næstfremstar, og 10-mannafarið hjá okkum gjørdist nummar trý. Tað man vera langt síðani, at klaksvíkingar var nummar trý á norðoyarstevnu.

*Men hondina á hjarta. Vóru tit ikki eitt sindur vónsviknir av, at tað ikki hilnaðist betri hjá 10–mannafarinum hjá tykkum, enn tað gjørdi?*

– Vit høvdu sjálvandi vónað, at tað skuldi eydnast at vinna fyri fyrstu ferð í 32 ár, men vit vóru greiðir yvir, at tað fór at verða sera trupult. Hinar manningarnar tykjast vera sera væl fyri, og vit rokna við, at talan fer at verða um eina sera tætta kapping tær næstu ferðirnar, heldur formaðurin í Klaksvíkar Róðrarfelag, Kristian Eli Zachariasen.

## Kappróður – úrslit

**5-mannfør dreingir**

| | bátur | tíð |
|---|---|---|
| 1 | Fípan Fagra | 5.58,10 |
| 2 | Tjaldrið | 6.01,04 |
| 3 | Blikur | 6.03,22 |
| 4 | Sílið | 6.05,25 |
| 5 | Drekin | 6.08,22 |
| 6 | Havfrúgvin | 6.16,17 |
| 7 | Firvaldur | 6.33,03 |
| 8 | Ørnin | 6.36,16 |
| 9 | Junkarin | 6.43,17 |

**6-mannafør, kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Jarnbardur | 6.27,03 |
| 2 | Páll Fangi | 6.35,20 |
| 3 | Riddarin | 6.37,21 |
| 4 | Gongurólvur | 7.07,17 |
| 5 | Víkingur | 7.16,19 |
| 6 | Lómur | 7.22,21 |
| 7 | Hvessingur | 7.31,19 |

**5-mannafør, gentur**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Sílið | 6.09,09 |
| 2 | Fípan Fagra | 6.28,09 |
| 3 | Ørnin | 6.34,23 |
| 4 | Blikur | 6.38,07 |
| 5 | Havfrúgvin | 6.40,23 |
| 6 | Drekin | 6.41,07 |
| 7 | Tjaldrið | 6.46,09 |
| 8 | Frúgvin | 6.56,01 |
| 9 | Junkarin | 7.17,01 |
| 10 | Tekla | 7.17,14 |
| 11 | Royndin Fríða | 7.24,12 |
| 12 | Dúgvan | 7.40,16 |
| 13 | Firvaldur | 7.45,18 |
| 14 | Broddur | 8.06,12 |

**6-mannafør, menn**

| | |
|---|---|
| 1 | Páll Fangi |
| 2 | Smyril |
| 3 | Hvessingur |
| 4 | Gongurólvur |
| 5 | Sølmundur |
| 6 | Strálan |
| 7 | Snopprikkur |
| 8 | Jarnbardur |
| 9 | Hósvíkingur |

(Tíðirnar vóru ikki upplýstar)

**8-mannafør**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Argjabáturin | 8.33,19 |
| 2 | Kvívíkingur | 8.36.00 |
| 3 | Knørrur | 8.45,15 |
| 4 | Húsavíkingur | 9.26,20 |
| 5 | Kvívíksbáturin | 9.28,24 |

**10-mannafør**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Eysturoyingur | 7.57,21 |
| 2 | Havnarbáturin | 7.59,19 |
| 3 | Klaksvíkingur | 8.08,12 |
| 4 | Vestmenningur | 8.17,07 |